# Bóndin skal vera virkisleiðari

*Ov lítið er hjá bóndanum bara at vera ein, sum arvar ein garð fyri at bera traditiónina víðari. Hann skal hugsa um jarðarbrúkið sum eitt toppprofessionelt rikið virki*



*Ole Christen Hallesby heldur, at samfelagið eigur at viðurkenna bóndastættina heldur betri, enn gjørt verður í dag.*

Edvard Joensen

Skal tað bera til at liva av jarðarbrúki, er neyðugt, at bóndin eisini kennir til nútíðar virkisrakstur. Tað er ikki nokk at duga at mjólka og kenna seyð. At hava skil á roknskapinum er minst líka umráðandi.

Ofta hoyrast bøndur klaga um, hvussu tungt tað er at fáa landbúnaðin at bera seg fíggjarliga. Men verður hann so spurdur um, hvussu stór íløgan er fyri hvørt kilog av kjøti ella litur av mjólk, hann framleiðir, dugir hann mangan ikki at svara. Hann hevur stutt sagt ov lítið skil á roknskapinum, sum er líka neyðugur í landbúnaðinum, sum hann er í handilsvinnuni ella á flakavirkinum.

Tað ber ikki til at klaga um eitt ting, sum tú als ikki kennir. Og kennir tú ikki orsøkina til, at tað gongur illa, ber heldur ikki til at venda gongdini.

Tað letur til, sigur norski búnaðar- og fíggjarfrøðingurin, Ole Christen Hallesby, at ein stórur partur av bøndunum eru í einum stórum, passivum bólki, bara tí, at teir av tradition skulu vera bøndur, og ikki tí, at teir tíma tað.

Ole Christen Hallesby var um vikuskiftið í Føroyum og helt skeið fyri føroyskum bøndum. Skeiðið varð hildið á Hotel Vágum leygardagin og sunnudagin.

Ole Christen Hallesby sigur um føroyskar bøndur, at sum framleiðarar eru teir dugnaligir, men sum virkisleiðarar og roknaskaparmenn eru teir amatørar.

**Arvur**

Bóndin er berari av traditiónini og mentanararvinum. Spurningurin er so, um hetta verður ein mótsøgn til tað at vera bóndi. Tað vil siga ein konflikt millum framleiðaran og mentanarberan.

Í Noreg er ein tradition fyri, at bóndin skal vera bæði framleiðari og mentanarberi, sigur Ole Christen Hallesby. Og so kemur tann triðja konfliktin. Ber tað til fíggjarliga at vera bóndi?

Ole Christen Hallesby greiðir frá, at nógvir norskir bøndur hava arbeiði við síðuna av jarðarbrúkinum við tí úrsliti, at tá tað er gjørt, er ikki orka til rættiligt jarðarbrúk. Og so býtur alt seg aftur í halan.

Hetta man heldur ikki vera so øgiliga ókent hjá føroyskum bøndum, metir hann.

Norski búnaðar- og búskaparfrøðingurin heldur, at tað má vera uppgávan hjá politikarunum at syrgja fyri, at tað verður førdur ein politikkur, sum tryggjar bóndanum fíggjarliga grundarlagið. Tí eingin kann rokna við, at tað at vera bóndi í sær sjálvum er eitt arbeiði, sum gevur pengar.

**Ætt eftir ætt**

Á stevnuni í Vágum kom meira enn einaferð fram, sigur Ole Christen Hallesby, at tað bara verður roknað við sum givið, at tann elsti sonurin í bóndaættini verður tann, sum ber arvin og mentanina víðari. Eisini hóast hann yvirhøvur ikki er áhugaður. Tað liggur alla tíðina sum eitt tigandi krav frá umheiminum, at soleiðis skal tað vera. Men mangan er tað soleiðis, sigur Ole Christen Hallesby, at eingin tosar við viðkomandi sjálvan um, hvat hann ætlar. Og tað er meira enn einaferð endað við, at tann, sum kanska er best egnaður og áhugaður, verður settur til viks, tí tann eldri, sum hvørki tímir ella dugir, av gamlari tradition skal verða bóndi. Hann hevur jú rætta navnið.

Tað hevur sínar avgjørdu vansar, tá maður kennir seg noyddan at bera ættararvin víðari. Úrslitið verður ógvuliga ofta ein útbrendur maður, sum nógv heldur vil gera alt annað. Av tí sama verður eingin kontinuitetur. Alt verður standandi í stað ella í ringasta føri forferst.

Ole Christen Hallesby sigur, at summir bøndur av natúr eru eitt ógvuliga konservativt fólkaslag. Í summum førum bókstaviliga konserveraðir, heldur hann. Men sjálvandi eru tað undantøkini. Tað er greitt. Men í Føroyum er ikki langt av leið at siga, at vit eru uppsteðgað á mongum økjum innan landbúnaðin.

Tí var ein av uppgávunum á skeiðnum júst at siga fólki, hvussu týdningarmikið tað er at duga at hugsa øðrvísi ella ótradiotionelt.

**Lítið umhildið**

Tað eru mótsetningar í jarðarbrúkinum, sigur Ole Christen Hallesby. Bøndurnir vilja mangan sjálvir bera arvin og traditiónirnar víðari, men sita samstundis og klaga um, hvussu illa tað ber til fíggjarliga.

Her heldur Ole Christen Hallesby, at samfelagið eigur at viðurkenna bóndastættina heldur betri, enn gjørt verður í dag. Mangastaðni verður tað beinleiðis lítisvert at vera bóndi. Og tað kemst ofta av, at ov fáir pengar eru í fakinum.

Hetta ávirkar sjálvandi eisini tann, sum skal liva av hesum. Hann kennir seg verri fyri enn onnur og hevur kanska lyndi til at geva skjótari upp av tí sama. Men bóndin má sjálvur gera sær greitt, at tað hann ger, er neyðugt. Og eisini má samfelagið sum so fáast at skilja, at landbúnaðarframleiðslan er beinleiðis lívsneyðug fyri at fáa samfelagið at koyra.

Men tað kann ikki bara vera í veitslutalunum, at slíkt kemur fram, sigur Ole Christen Hallesby. Tað má gerast nakað við búskapin, og vit noyðast at síggja í verki, at politikararnir veruliga vilja gera nakað fyri at hjálpa landbúnaðinum.

Bøndurnir uppliva í dag, at teir als ikki verða virdir av politikarunum. Ole Christen Hallesby sigur, at bøndur hava greitt honum frá, at tað hava verið ráðharrar, sum beinleiðis hava sagt, at landbúnaður er so lítið málsøki, at tað tíma teir ikki at fáast við. Tí má onkur annar taka sær av.

Samfelagið í dag hevur líkasum hug at meta virði eftir búskapinum. Her hava vit eina stætt, sum hevur lægri tímaløn enn tann, sum byrjar nýggjur við kassan í supermarknaðinum. Tá er tað skjótt, at samfelagið sigur, at hetta, tú gerst, er einki vert.



*Leygardagin helt norski Ole Christen Hallesby fyrilestur um búnaðarmál. Hetta var partur av eini stevnu á Hotel Vágum um evni at vera bóndi*



# Sjómansheimið nútíðarger

*Klaksvíkar Sjómansheim skal umbyggjast og nútímansgerast. Tann parturin av arbeiðinum, sum nú er i gongd, fer væntandi at kosta út móti eini millión, verður sagt av Sjómansheiminum*

Klaksvíkar Sjómansheim verður umvælt og nútíðargjørt fyri umleið eina millión.

Seks kømur, umframt »suituna«, gongina og móttøkuna skulu gerast av nýggjum í hesum umfarinum. Framman undan eru tvey kømur gjørd.

Arbeiðið er í gongd í løtuni, men verður steðgað, tá summarferðingin rættiliga kemur fyri. Seinni verður arbeiðið so tikið uppaftur, verður sagt av Klaksvíkar Sjómansheimi.

Sjómansheimið er umleið 40 ára gamalt og treingir til ein rættiligan umgang innan fyri at fylgja altjóða støði.

Sagt verður av Sjómansheiminum, at kostnaðurin av umbyggingini liggur umleið 100.000 krónur fyri hvørt kamarið. Tað kann tykjast at vera ein øgiligur prísur. Men tá hugsað verður um alt, sum gerast skal millum skins og holds, so sum útskifting av rørum og so framvegis, so man kostnaðurin kortini vera á leið, heldur leiðslan á Klaksvíkar Sjómansheimi. Tá hetta umfarið er liðugt, fer kostnaðurin væntandi at tátta í milliónina, meta tey á Sjómansheiminum.

Samlaða kamarstalið fer at lækka við hesi útbyggingini av tí, at alt nú verður gjørt til dupultkømur. Men tað er neyðugt, siga tey. Stutt og greitt, tí kundin krevur altjóða støði. Í dag vil eingin gjalda fyri eina song, har wc og bað eru á gongini saman við øðrum gestum.

Tað er sjálvandi møtimikið hjá Sjómansheiminum at fara undir slíka útbygging. Men gongdin hevur verið soleiðis seinnu tíðina, at tey trúgva upp á, at tað fer at bera til. Gistingarnar hava verið støðugar, ella í øllum førum ikki í minking, sum tikið verður til. Og væl av øðrum tiltøkum vera eisini hildin á Sjómansheiminum. Slík tiltøk, har fólk biða um størri døgurðar, bæði at hava inni á Sjómansheiminum og eisini slíkt, sum latið verður út úr húsinum.

Tað eru ymisk fólk sum búgva á Sjómansheiminum alt eftir árstíðini. Um summarið eru tað mest útlendsk ferðafólk. Og sum ikki einaferð verða týskarar nevndir fyrst. Annars eru tað fólk, sum koma til Klaksvíkar til eitthvørt stytri tiltak ella arbeiði. Onkur skúlanæmingur og onkur fótbóltsleikari búgva fast. Eisini er nakað av fólki, sum etur fast á Sjómansheiminum.




*Klaksvíkar Sjómansheim er umleið 40 ára gamalt og treingir til umvælingar (Mynd: Jens Kristian Vang)*

# Ungur føroyingur økonomur hjá DONG

Jan Müller

Tann 26 ára gamli havnamaðurin Regin Hammer er valdur út millum rættiliga nógvar umsøkjarar til eitt av teimum týðandi størvunum hjá danska olju- og gassfelagnum DONG, ið ætlar sær at vera við í oljuleitingini við Føroyar.

Regin Hammer, sum í dag starvast hjá Fíggjarmálastýrinum, skal taka við starvinum sum økonomur í leitingar- og framleiðslu deildini hjá DONG 1. mai. Hann skal arbeiða á høvuðsskrivstovuni, sum liggur í Hørsholm nærhendis Keypmannahavn.

Regin Hammer hoyrir til tað ættarliðið at ungum føroyingum, sum hevur valt oljuvinnuna sum sítt framtíðar livibreyð. Hugurin hevur alla tíðina verið til økonomi og lærugreinar við tilknýti til hesa lærugrein. Eftir lokið studentsprógv læs Regin økonomi á Fróðskaparsetrinum í eitt ár og higani gekk so leiðin til skotska oljubýin Aberdeen, har Regin tók eina trý ára útbúgving innan búskaparfrøði á Robert Gordon University.

Stóri áhugin hjá altjóða oljuheiminum fyri føroyska landgrunninum hevur helst eisini birt uppundir áhugan hjá Regini fyri oljuvinnuni, tí eftir lokna útbúgving í Aberdeen fekk hann eitt stipendium frá AMG-oljubólkinum (Tað eru Statoil, Mobil og Enterprise) at lesa við oljubúskaparfrøði við lærda háskúlan í Dundee. Eftir hetta arbeiddi Regin í eina tíð hjá Enterprise í London. Síðani gekk leiðin heim til Føroya og hevur Regin arbeitt hjá Fíggjarmálastýrinum í skjótt tvey ár. Har hevur hann serstakliga tikist við at tilrættaleggja kolvetnisskattalógirnar, sum nú eru samtyktar av løgtinginum.

Uppá fyrispurning um tað ikki verður ein missur fyri føroyskar oljumyndugleikar, at útbúgvin fólk sum hann fara til oljufeløgini at arbeiða sigur Regin Hammer, at hetta er ein náttúrligur útviklingur. Tað er eisini av týdningi at fáa føroyingar við í arbeiði at finna oljuna. Tað er eisini avmarkað, hvussu mong kunnu arbeiða innan tað almenna.

Stóra takið her heima er tikið við øllum fyrireikingunum til 1. útbjóðing, og harnæst er tað eisini eitt ynski frá føroyskum myndugleikum, at útlendsk oljufeløg, sum ætla at arbeiða við Føroyar, seta føroyingar í størv. Regin Hammer sigur, at hann hevur vónir um at skula arbeiða við Føroyaøkinum sum frálíður.

Fyri seg sjálvan er tað eisini ein størri faklig avbjóðing, tí hetta er tað øki hann hevur specialiserað seg í. Sjálvur heldur Regin Dong verða eitt áhugavert felag og hann sær fram til nýggju avbjóðingina.



*Regin Hammer hevur fingið týðandi starv hjá danska felagnum DONG*

1000 ára haldið

www.tusund.fo

**Frá 1000 ára haldinum**

**Skrá fyri februar og mars**

| Dagf. | Sta›ur | Tiltak | Fyrilestrahaldari | Evni |
|---|---|---|---|---|
| **Mikudagin** 01.03.2000 | Tórshavn Listaskálin kl. 20.00 | Fyrilestur og konsert vi› Havnarkórinum | Marjun Bæk | Thomas Kingo |
| **Sunnudagin** 12.03.2000 | Klaksvík Kirkjukjallarin kl. 16.00 | Fyrilestur | Martin R. Jacobsen | Apostólsku fedrarnir |
| **Sunnudagin** 12.03.2000 | Dalur Bygdahúsi› kl. 16.00 | Fyrilestur og konsert vi› Sandoyar Manskóri | Sverri Egholm | Heidnir si›ir upp í okkara øld |
| **Sunnudagin** 12.03.2000 | Kollafjør›ur Kirkjan kl. 16.00 | Fyrilestur og konsert vi› Vestmanna Sangkóri | David Johannesen | Martin Luther |
| **Sunnudagin** 19.03.2000 | Tórshavn kl. 16.00 | Fyrilestur og konsert vi› | Martin R. Jacobsen | Apostólsku fedrarnir |
| **Sunnudagin** 26.03.2000 | Nor›skála Kirkjan kl. 16.00 | Fyrilestur Dupultkvartett úr Runavík | Martin R. Jacobsen | Apostólsku fedrarnir |
| **Mánadagin** 27.03.2000 | Glyvrar kl. 19.00 | Fyrilestur og konsert vi› Eystankórinum | Magnus Jørgensen | Kaj Munk |



RZ008